# Shalom-Blaðið

**Nr. 1** * **17. árgangur** * **Apríl 2010** * **Ísraelsmissiónin**

# Volontørur í 5 mánaðir í Ísrael

***Seinast í januar fór 19 ára gamli Árni Petersen úr Klaksvík til Ísraels, har hann starvast sum volontørur. Hann hjálpir til í einum suppukøki, hjálpir til at gera íbúðir í stand, og hjálpir til á einum skúla fyri autistar. Harafturat hevur hann sæð og upplivað nógv av teimum kendu bíbilsku støðunum***

*Orð: Frants Jensen,*
*Mynd: Privat*



*Árni Petersen saman við Amir í suppukøkinum í Jerúsalem.*

Árni arbeiðir sum volontørur gjøgnum danska felagsskapin Ordet & Israel í verkætlanini Yad va Lev (við hond og hjarta). Umframt hann, so eru eisini fleiri danskir volontørar. Árni verður eftir ætlan í Ísrael til seinast í juni.

– Mær dámar sera væl. Vit hava ein sera góðan kristnan felagsskap millum volontørarnar, og tað er eisini serligt at vera í Jerúsalem og uppliva øll tey bíbilsku støðini. Tað er tó nógv, ið er øðrvísi her, og nógv eg skal venja meg við, til dømis at arbeiða sunnudag, og ístaðin at halda leygardagin sum heiligdag, segði Árni, tá ið eg prátaði við hann á skype í seinastu viku. Árni hevur sent nøkur brøv heim, og vit taka her brot úr teimum.

## Suppukøkurin

Suppikøkurin er eitt stað fyri fátækar jøðar. Her kunnu teir koma og fáa sær eina góða ókeypis máltíð. Hetta verður gjørt í samstarvi við kommununa, og tí er tað bert heilt fátøk, ið koma at eta. Men øll síggja ikki eins fátøk út. Lønarútreiðslurnar eru ikki tær stóru, tað eru bert trý, sum eru starvslønt, harav er lønin hjá tí eina, at hann fær mat heim við til familjuna. Vanliga koma umleið 200, meðan 150 fáa "take away".

Vit koyra við bussi kl 07:30 til suppukøkin. Hesin túrurin tekur góðar 20 minuttir. Tá ið vit koma inn, er tað fyrsta vit møta Amir (køksleiðarin). Hann bjóðar okkum vælkomin við orðunum "drink coffie, please." Hann er ikki heilt skarpur í enskum, men kann nakrar fáar setningar. Tað er stuttligt at síggja, hvussu hann stilt og friðarliga koyrir køkin. Hann veit ongantíð, hvussu nógv arbeiðsfólk, hann hevur at taka av. Øll kunnu koma og hjálpa til, hetta bæði sæst og hoyrist. So ein vanligan arbeiðsdag kunnu tað vera sera ymisk fólkasløg. Hesa vikuna hava millum annað verið fleiri hollendarar, nøkur skúlabørn og so er tað eisini altíð volontørar aðrastaðni frá, men ongantíð teir somu í fleiri vikur.

Vit eru nú komin at kenna starvsfólkini betur, og eru eisini komin inn í dagligu gongdina, og hetta ger, at tingini fella nógv lættari uppá pláss, enn tey gjørdu fyrsta dagin.

## Gera íbúðir í stand

Eisini arbeiðið í íbúðunum verður gjørt í samstarvi við kommununa í Jerúsalem, so at bert tey fátækastu fáa hjálp. Um íbúðirnar kann sigast, at tað er ikki ein vøkur sjón, vit møta, tá ið vit opna hurðina og byrja at hyggja eftir íbúðini, men húsfólkini eru altíð sera blíð og fegin yvir tað hjálp, vit veita. Tað, sum eg havi upplivað, er at síggja eina heila íbúð, har allir veggirnir eru rotnir. Her mátti so at siga alt brótast niður, og so bara spartla eitt tjúkt lag. Ein vanligur arbeidsdagur úti í einari íbúð fevnir um: Spartling, pussing, máling...

## Skúli fyri autistar

Sum nakað nýtt, so havi eg fingið eitt "arbeiði", har eg hjálpi til á einum skúla fyri autistar. Sigast skal, at hetta er eitt arbeiði, sum tekur tíð. Tað tekur tíð at læra børnini at kenna; tá skal eisini havast í huga, at eg dugi ikki at tosa hebraiskt, so her má eg bara smíla og royna at vísa kærleika við hond og hjarta (Yad va lev).

Eg eri komin at kenna starvsfólkini og børnini betur, men tað er ikki altíð líka lætt at vita, hvussu forholdið er millum teg og autistin. Eg merki til tíðir, at teir halda seg meir og meir at mær. Eg fekk at vita frá eini gentu, ið eg tosi meir og meir við, at drongurin, ið altíð vil leiða meg, plagar annars ikki at tíma leiða nakran. Hetta tók eg sum nakað jaligt :)

## Hann er risin upp

Tað gongur sera væl í Jerúsalem. Eg havi akkurát havt eina viku "feriu", har vit hava verið og vitjað bíbilsk støð runt í Jerúsalem. Vit hava millum annað verið í havanum, har tann tóma grøvin er. Hetta er eitt stað, har Jesus møguliga er krossfestur og lagdur í grøv. Men óansæð hvat og hvussu, so talaði tað sterkt til mín, at tað stóð: "He is not here. He is risen." (Hann er ikki her, hann er risin upp.) Halleluja!

## Via Dolorosa

Á páskum vóru vit hjá danska prestaparinum. Har ótu vit ein góðan bita og hugdu síðan eftir Passion of the Christ. Hetta var ein fínur máti at innstilla tankarnar til komandi dagarnar.

Langa fríggjadag gingu vit Via Dolorosa saman við fleiri danskarum. Tað eru 10 steðgistøð, og á hvørjum staði steðgaðu vit á, lósu ein tekst og sungu ein sang. Hetta var eisini nakað serligt, tí at tað vóru ikki bert danskarar við í hesari gongu, men eisini túsundtals av ferðafólki og katolikkum. Túrurin endaði við eini danskari gudstænastu.

## Sinai og Jórdan

Eg havi eisini verið ein Sinai/Jórdan túr saman við íalt 40 ungum frá Ísraelsmissiónini og Lærusveinaskúlanum í Tiberias. Hetta var ein stór uppliving, har vit millum annað yvirnáttaðu uppi á Sinai, og bæði sóu sólina seta og rísa. Vit gingu í ørkini, og vit yvirnáttaðu hjá beduinum. Vit riðu á kamelum, (eg var fremstur, og føldi meg sum ein hirða. Gav eg kamelinum eitt lítið fitt slag, so var bara ein vegur, og tað var frameftir. Vit yvirnáttaðu í smáttum á strondini vid Reyðahavið. Vit vóru jeeptúr í Wadi Rum. Vit gingu runt umkring í Petra (har eitt petti av Indiana Jones er upptikin). Eg havi eisini fingið nógv stempul í mítt pass. YEES :)

## Styrkin er í Jesusi

Árni hevur upplivað nógv í Ísrael, men hann viðgongur tó, at hann onkuntíð leingist eitt sindur heim. Hann sigur soleiðis at enda í einum av sínum brøvum: Eg má finna hvíld og styrki í mínum Harra og frelsara. "Eg orki alt í honum, sum ger meg sterkan." Samstundis so havi eg brúk fyri at síggja meir og meir av Guds kærleika, soleiðis at eg til eina og hvørja tíð vísi Guds kærleika yvir fyri øðrum.